# Vitanarbúskapur, OECD kann um krøvini til Evropa

» *… í verður framtíðar effektivi búskapurin tann sum framleiðir mest kunning og vitan, og samstundis ger hesa kunning og vitan lætt atkomuliga fyri flest møgulig virkir og einstaklingar.*




*Framtíðar útbúgvingarskipan skal hava bæði bleyt og hørð virðir*

BOGI ELIASEN
cand.scient.pol



VINNUSÍÐU-ANALYSAN

## Altjóða kappingarføri

Ein fastur táttur í kjakinum um altjóðagerð er kappingarføri og hvussu Føroyar klára seg í mun til onnur lond. Flestu lond hava ætlanir ella visjónir, hvussu framtíðin skal taklast. Alt ES hevur sonevndu Lissabon málini sum siga, at ES londini skulu verða tey mest kappingarføru og dynamisku í vitanartengdum búskapi.

## Frágreiðingin

OECD hevur fyri kortum latið úr hondum frágreiðing sum vísir á, at tað er alneyðugt hjá evropeisku londunum at satsa uppá meira og betri útbúgvingar.

## Handilsforðingar falla

Víst verður á, at tíðin er farin tá Evropa kappaðist móti londum sum bjóða lága løn fyri ikki faklært arbeiði. Í dag er støðan, at t.d. Kina og India fyri lágan kostnað kunnu bjóða serkøna arbeiðsmegi og at tað at hesi lond styrkjast á hesum økjum. Handilsforðingar falla og Evropa kann tí í veruleikanum ikki gera stórt fyri at steðga tilgongdini, uttan at tað hevur við við sær umfatandi kostnað fyri okkara egnu búskaparligu støðu.

## Útbúgving og framgongd

Frágreiðingin hevur kannað samanhangin millum útbúgving og framgongd, og niðurstøðan er púra greið. Skal Evropa framhaldandi verða í toppinum, so krevur tað at nógv størri dentur verður lagdur á útbúgvingar, og at hesar verða meira fleksiblar eins og dentur eisini skal leggjast á fyrstu útbúgvingarárini. Men sagt verður eisini, at tað er ikki bara um pening, men heldur at talan er um fleksibilitet og effektivisering. Serliga Finland verður tikið fram sum eitt dømi, um hvussu útbúgvingarnar kunnu betrast munandi.

## Útbúgving – ein samfelagsíløga

Frágreiðingin vísir á, at tað lønar seg hjá einum landi at leggja dent á útbúgving, og at peningur brúktur til útbúgving verður vunnin inn aftur, tí at kappingarførið verður betrað, sum ger at búsparliga úrtøkan gerst størri.

Frágreiðingin brúkar Korea sum dømi um hvat ein miðvís satsing á útbúgving kann. Víst verður á at Korea og Afghanistan høvdu á leið sama BTÚ í sekstiárunum og at Korea lá niðarliga á útbúgvinarlistanun. Ídag er Korea nummar trý á OECD listanum viðvíkjandi útbúgvingarstøði hjá teim 25 til 34 ára gomlu. Víst verður eisini á, at Týskland og Frakland á OECD útbúgvingarstyrkilistanum er farin aftureftir, og tí verður mett at hesi bæði ES høvuðslondini ikki longur teljast millum heimsins fremstu at menna vitan og førleikar. Kanningin vísir á, at Evropa enn hevur nakrar av heimsins bestu skúlum og skúlaskipanum, men at tað er avgerandi neyðugt við broytingum, um Evropa skal



*Lærast skal alt lívið*